

Kom og les og lær

# EIN NÝGGUR SKÚLI

## Í hjartanum í Føroyum

Heldur tú umhvørvi, burðardygd og náttúra eru spennandi? Kundi tú hugsað tær at gingið á einum nýmótans miðnámsskúla við øllum hugsandi hølum og hentleikum?

Miðnám í Vestmanna er ein skúli við trimum flokkum. Her er bæði tíð og pláss til hvønn einstakan næming. Bussurin koyrir beint til hurðina og eisini ber til at finna sær bústað í bygdini. Vit hugna okkum saman í fríkorterunum við tónleiki, kortspølum og øðrum. Les meira á miv.fo



# MIÐNÁM Í VESTMANNA

## Hin grøni skúlin


Postrúm 96

FO 350 Vestmanna

Tel. 42 45 73

miv@miv.fo

www.miv.fo

www.facebook.com/midnamivestmanna





# MIÐNÁM Í VESTMANNA

## Hin grøni skúlin




# VÆLKOMIN

Miðnám í Vestmanna er ein miðnámsskúli, sum gevur almennan lestrarførleika til hægri lærustovnar, á jøvnum føti við hinar gymnasialu breytirnar í Føroyum.

**Grøna tilfeingisbreytin**
Breytin á skúlanum eitur tilfeingisbreytin, har lærugreinar innan náttúrutilfeingi mynda skúlan. Her eru eisini onnur fak, so sum søga, ítróttur og mál. Vit eru regluliga á virkisvitjanum, í laboratorium, ella gera royndarkanningar úti í náttúruni. Uttanlanda námsferð er eisini vanligt.

Breytin er ætlað teimum, sum hava áhuga fyri náttúru, umhvørvi og burðardyggari gagnnýtslu av okkara náttúruríkidømi.

# FAK

Á tilfeingisbreytini eru átta kravdar lærugreinir fyrsta árið. Átta eru eisini kravdar annað árið. Ein er valfríð. Triðja árið eru einans tríggar kravdar lærugreinir. Tríggjar eru valfríar.

Tilfeingi A er stóra lærugreinin, har arbeitt verður við verkætlanum. Økini eru: Náttúrutilfeingi, aling, landbúnaður, fiskiskapur og veiða, framleiðsla og náttúrunýtsla.

Umframt tær báðar kravdu A-lærugreinarnar, so skalt tú í minsta lagi lyfta eina lærugrein afturat frá B- til A-stig.



Talan er um eina grøna gymnasiala breyt, sum tekur trý ár. Mest vanligt er, at lesa víðari á universiteti, men eisini ber til at fara beint í arbeiðslívið, at skapa sær eina framtíð. Til dømis sum íverkseti, lívfrøðisatstøðingur, ella náttúruvegleiðari.

**Her følir tú teg heima**
Umstøðurnar eru framúr góðar á skúlanum. Næmingar hava atgongd til ein nýmótans køk við øllum hentleikum, har tað ber til at gera sín egna mat. Vit hava eisini hugnaumhvørvi við ljóðførum, borðtennis, og sofum at blaka seg í. Eisini spæla vit ymisk spøl, telva, ella fáa okkum ein kaffimunn.




